

*Hetta eru fagnaðarkvæði til kám, støkkin, víkjandi mannahugtøksum vón, frælsi, vakurleiki, kærleiki og ævinleiki. Hon syngur fyri teimum, sum eru deyð og gloymd, og fyri teimu, sum ikki vórðu hoyrd skrivar Jóannes Lamhauge. Her Loreena á palli saman við sínum tónleikarum*

*Mynd Jan Müller*

Lívið er vakurt júst tí at tað er so stutt, og meðan vit eru her liggur øll heimssøgan í lógva okkara. - Lurta eftir mær nú, tí tað handlar jú ikki um nakað annað enn løtuna, ið vit eiga saman beint nú. Alt annað er uttan týdning.

## Leitanin og ferðin

Boðskapurin er í grundini einfaldur. Næstakærleiki, náði, harmoni, virðing fyri fleirleika, náttúru og forfedrum, andanum, gátuni, leitanini og ferðini. Loreena McKennitt er ein humanpolitiskur pasifistiskur peikifingur.

Við tónleikinum holdnemur hon eitt optimistiskt og næstan naivt álit, har hon treiskt og tvíhildið trýr á tokkan í menniskjuni og í tí kollektiva tilvitinum. Hon nýtir ferðina og langa keltiska flytiævintýrið upp gjøgnum Evropu sum eina øðrvísi mynd til at minna okkum á, at sum menniskju ferðast vit øll, og øll leita vit. Vit leita, tí at tað er so ómetaliga nógv at leita eftir, og tað er so nógvur lærdómur og so nógv ríkidømi at finna, um vit leggja nakað í tað. Vit hava bara lyndi til at gloyma, at lívið er alt ov stutt til ósemjur og at útihýsa hvør øðrum, tí vit ikki líkjast. Ístaðin eiga vit at minnast, at tað er so nógv meira, ið kann knýta okkum saman, enn slíta okkum sundur.

## Nakað heilt serligt

Tveir alt ov stuttir tímar sníkja seg framvið. Tey á pallinum takka fyri seg, og øll standa og klappa, ið eru før fyri at standa.

Meðan glymurin rungar, verði eg sum ummælari noyddur til at rysta hetta piprilsi av mær, taka samanum og draga eina skilagóða ummælaraniðurstøðu. Men hvat merkja seks út av seks stigum í veruleikanum?…Um ein hugsar seg um er tað jú burtur úr vón og viti at viga nakað, ið ikki letur seg viga, tí sannleikin er tann, at henda ógloymandi upplivingin hvørki kann metast í orðum ella tølum, og er tað ikki eisini líkamikið tá samanum kemur? Loreena McKennitt er onkursvegna meira enn alt hetta. Hetta er fyrst og fremst andaligur tónleikur, ið fram um alt viðger og kveikir tað innasta og dýrasta í okkum. Hon ber fram, at tað ferðandi og leitandi lyndið er nakað, ið liggur inngrógvið í okkum, tí vit menniskju í roynd og veru kanska ikki eiga nakað, sum vit kunnu kalla eitt *heim*. Hon fyrislær, at somatiska tilvitið er nakað, ið ikki eigur at tykjast okkum so fjart, og at sálin er ein størri partur av okkum enn vit ganga og halda. Hetta er kjarnin í okkum og vit eiga at verja og røkja hann, tí at tað er her inni vit mega finna tað vit leita eftir, óansæð um tað er Guði ella okkum sjálvum.

Kanska eru hugmyndirnar hjá Loreenu rein utopi, og kanska eru hetta bara tankarnir hjá einum bjartskygdum droymara úr Kanada, men hvussu er og ikki, so er tvørsøgnin við at dýrka ein fullkomnan mystikk samantvunnin við leitanini eftir einum algildum svari, eitt greitt tekin um, at vit innast inni kanska ikki ynskja at finna tað vit leita eftir. Vandi er jú fyri, at vit gerast vónsvikin av tí vit finna, og at drívmegin og spenningurin hvørvur um vit velja at loysa ta stóru gátuna.

Tað at vit ikki kenna ferðamálið á ferðini ger jú at pílagrímsferð okkara ongantíð kann enda. Hetta er ein menniskjalig ringrás, millum átrúna og empiriskt skygni, gátuna og svarið. Og tað er júst hesin viðkomandi tvíleikurin, sum er við til at gera tónleikin hjá Loreenu McKennitt til nakað heilt serligt. Restin er gandur.



*Eftir framførsluna handaði Jóannes Loreenu McKennitt reyða rósu sum tøkk og áminning um, at hon eisini eigur eitt ella nøkur hjørtu í Føroyum*

*Mynd Jan Müller*



*Blaðstjórin á Sosialinum og trúgvur "Loreenu-fan" her saman við songkvinnuni undan framførsluni í Keypmannahavn. Jan Müller tók saman við Jóannes Lamhauge stig til samrøðu við hana og buðu báðir henni at vitja í Føroyum. - I look farward so sing there soon tók hon til, áðrenn hon fór á pallin*

*Mynd Jóannes Lamhauge*

## Loreena McKennitt og Jóannes Lamhauge í Rás 2

Í Rás 2 hjá Miðlavarpinum mánadagin 10. des. kl.11.00 bar til at hoyra tónleik hjá Loreenu McKennitt, umframt brot úr samrøðuni við hana. Heri Simonsen tosaði við Jóannes Lamhauge, sum var til konsert við kanadisku songkvinnuni í Keypmannhavn fyrr í ár. Nú ber eisini til at keypa tónleikin hjá Loreenu McKennitt í teimum størru fløguhandlunum í Føroyum.

Sending um kandisku songkvinnuna Loreenu McKennitt við Jóannes Lamhauge og Jan Müller í Rás 2 mánamorgun verður endursend klokkan 22.00 mánakvøld.